sernám

NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

**Fysio- ella ergoterapeutur til Sernám**

Søkt verður eftir einum fysio- ella ergoterapeuti fulla tíð at byrja áleið hálvan august 2025 ella skjótast eftir tað.

Arbeiðsøkið hjá Sernámi er um alt landið.

**Høvuðsuppgávan í starvinum eru:**

- At gera sansa- og rørsluligar eygleiðingar og kanningar av børnum
- Ein uppgáva er í mun til børn, sum hava álvarsligar kropsligar avbjóðingar
- At veita ráðgeving og vegleiðing til starvsfólk á dagstovnum og skúlum, til foreldur og tey, ið annars eru um børnini. Í stóran mun er talan um børn undir skúlaaldur, har arbeitt við átøkum í tøkum tíma (tidlig indsats).
- At samstarva tvørfakliga innanhýsis og uttanhýsis

**Arbeiðsøkið er stórt og fjølbroytt við nógvum samskifti við starvsfólk, leiðslur, avvarðandi og aðrar viðkomandi stovnar, og tí vænta vit, at umsøkjari:**

- Er við at menna sernámsfrøðiliga virksemið á dagstovnum og í skúlum, m.a. við at deila fakliga vitan
- Er við í tvørfakligum samstarvi, innanhýsis og uttanhýsis
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- Dugir at skapa álit
- Dugir at samstarva við skiftandi fakbólkar
- Hevur áhuga fyri avbjóðingum, er fúsur at royna nýggjar leiðir og tolir broytingar
- Dugir at orða seg í skrift og talu

**Vit bjóða:**

- Eitt áhugavert og avbjóðandi starv við fjølbroyttum uppgávum
- Tvørfakligt mennandi umhvørvi í tøttum samstarvi við starvsbólkarnar í Sernámi
- Fakligt samstarv við ergoterapeut í Sernámi
- Førleikamenning eftir umstøðum og tørvi

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum fysioterapeutur ella ergoterapeutur. Fyrimun hava umsøkjarar við eftirútbúgving ella royndum innan barna- og ungdómsøkið.

**Setanartreytir til starvið:**

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Margreth Olsen, stjóra, á telefon 360 200 ella í teldubrævi til margreth@sernam.fo.

Tann, ið sett/ur verður, skal játta, at barnaváttan verður umbiðin. Fyri at verða sett/ur í starv, skal umsøkjarin hava reina barnaváttan.

**Umsóknarfreist:**

Umsóknir við avriti av prógvum, CV og øðrum viðkomandi skjølum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi sunnudagin 18. mei 2025 og skulu sendast til:

**Sernám**
**Bókbindaragøta 8**
**FO-100 Tórshavn**
**ella sum teldubræv til starv@sernam.fo**

Sernám veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving, vegleiðing og stuðul, soleiðis at børn og ung (0-18 ár) kunnu styrkjast í menningini, sum umfatar sosiala, kropsliga, persónliga, málsliga og kognitiva menning.

Tann, sum settur verður, má verða sinnaður at luttaka virkin í at menna Sernám sum stovn umframt at tola broytingar í starvinum.